# Veteranar leggja frá sær

**Í øllum trimum kommununum í Vágum leggja bygdarráðslimir, sum hava sitið fleiri valskeið, frá sær. Borgarstjórin í Bø stillar upp til bygdarráðið í Sørvági**

KOMMUNUVAL
*Edvard Joensen*

**Vágar:**
Borgarstjórin í Sørvági, Eivin Jacobsen, stillar ikki upp til kommunuvalið, sum verður tann 9. november. Heldur ikki formaðurin í Felagskommununi í Vágum, Jónhild Jørgensen í Miðvági, stillar upp aftur hesaferð.

Onkrar útskiftingar vera, tá nýggj bygdarráð verða vald í Vágum. Í øllum trimum kommunum, sum verða eftir nýggjar, skulu veljast nýggir bygdarráðslimir fyri onkrar, sum ikki stilla upp.

Í Sørvági stilla allir bygdarráðslimirnir uttan borgarstjórin, Eivin Jacobsen, uppaftur. Eivin Jacobsen hevur fyri nakað av tíð síðan boðað frá avgerð síni.

Um tað er møguleikin fyri einum borgarstjórasessi, sum ger stóra áhugan í Sørvági, skal vera ósagt. Men ikki færri enn fýra listar eru gjørdir til kommunuvalið í bygdini.

Millum listarnar, sum stilla upp í Sørvági, er ein listi við fimm ungum monnum, tann sonevndi ungdómslistin, sum rættiliga ætla sær at gera vart við seg í bygdarráðnum. Hesi menninir eru óroyndir í kommunalpolitikki.

Teir bygdarráðslimirnir, sum stilla uppaftur, eru spjaddir um hinar triggjar listarnar, sum lýstir eru.

Á einum av hesum listum er eisini verandi borgarstjórin í Bíggjar Sóknar Kommunu, Jógvan Páll Joensen, stillaður upp. Bíggjar Kommuna verður á nýggjárinum løgd saman við Sørvágs Kommunu.

Eisini onkur fyrrverandi politikari ætlar at gera come back. Suni Jacobsen, fyrrverandi lokal- og landspolitikari, eru uppstillaður til bygdarráðið í Sørvági hesaferð.

Í Miðvági eru tríggir listar gjørdir til valið. Til seinasta kommunuval var onkur politiskur listi. Men tað er ikki hesaferð.

Í Miðvági leggja tveir bygdarráðslimir frá sær. Tað eru Jónhild Jørgensen, sum seinasta valskeiðið hevur verið formaður í Felagskommununi í Vágum, og Marianna Simonsen, sum hevur sitið í bygdarráðnum í fleiri fylgjandi valskeið.

Hinir bygdarráðslimirnir stilla upp á tveimum listum. Tann triði listin hevur ongan verandi bygdarráðslim millum valevnini. Sum skilst í Miðvági er her talan um ein lista við fleiri útróðrarmonnum. Og hesin listin er tann einasti, sum hevur gjørt nakra skrá kunnuga, verður sagt í Miðvági.

Í Sandavági stilla allir bygdarráðslimirnir, uttan Regin á Lofti, uppaftur. Í Sandavági eru tveir listar gjørdir til kommunuvalið. Sitandi bygdarráðslimir eru á báðum listunum.

Í Sørvági verður skipað fyri veljarafundi í fimleikarhøllini nakrar dagar fyri val. Hóskvøldið 4. november sleppa tey, sum bjóða seg fram at stýra kommununi komandi fýra árini, at leggja fram tað, tey hava upp á hjarta, og ivaleyst fáa veljararnir eisini møguleika fyri at seta teimum ymsar spurngingar.

Einki er frætt úr hinum bygdunum í Vágum um, at ætlanir eru um nakran slíkan veljarafund.



*Í øllum trimum bygdarráðunum í Vágum verður nýtt fólk at síggja eftir nýggjár*

*Mynd: Edvard Joensen*

# Jóanis Albert saltar skinn



*Jóanis Albert og Hanus hava fingið upp í trilluøruna av skinnum, sum teir breiða út at turka, áðrenn tey verða saltað*

*Mynd: Edvard Joensen*

**Í Sandavági ganga smádreingir hús úr húsi og savna saman seyðaskinn, sum teir salta og selja**

FLETTING
*Edvard Joensen*

**Sandavági:**
Summi halda tað vera skeivt at blaka seyðaskinnini burtur, hóast lítið fæst fyri tey. Hugsanin er, at savnar tú bara nóg nógv, kann tað geva eitt sindur av sær.

Tað hava tveir sandavágsdreingir tikið til sín. Jóanis Albert hevur saman við eldra bróðrinum, Andriasi, sett eina plakat upp, har teir heita á fólk um at siga sær frá, tá tey fletta. So skulu teir taka sær av skinnunum.

Tað hava fólk so tikið til eftirtektar, og hugagóður hava teir so gingið runt og savnað skinn.

Hendan dagin kom Jóanis Albert stríðandi við eini fullari trilluøru við skinnum. Og hann skuldi eftir meira, greiddi hann frá, meðan hann breiddi skinnini uttan fyri hjá abbanum. Skyldmaðurin, Hanus, var og hjálpti honum.

Jóanis Albert segði, at teir høvdu fingið heilt nógv skinn. Fleiri hundrað.

Jú, tað kann vera strævið at baksast við stórar trilluørur, tá menninir eru smáir.

Men teir vænta sær okkurt afturfyri. Og tað dregur.

# Sólborg skjótt liðug á Skála

**Rækjutrolarin Sólborg stendur í dokkini á Skála, har gronin er skift út, og aðrar umvælingar eru gjørdar**

UMVÆLING
*Edvard Joensen*

**Skála:**
Rækjutrolarin Sólborg hjá Eileri Jacobsen hevur eina tíð staðið í turrdokkini á Skála, har ymsar umvælingar hava verið gjørdar á skipið.

Millum annað eru eini 12 - 13 tons av stáli skift í gronini, sigur Gunnar Mohr, stjóri á Skipasmiðjuni á Skála. Tað gjørdist eitt sindur meira enn væntað, sigur hann. Skaðin var eitt sindur longur aftur, enn teir hildu.

Umframt hevur Sólborg eisini skift aksilgenerator og fingið tríggjar nýggjar frystarar ísettar.

Gunnar Mohr væntar, at Sólborg verður liðug á skipsamiðjuni, tá ein vika ella so er farin av november.

Á bedingini uttan fyri Sólborg stendur eisini farmaskipið Sirius hjá Hera Thomsen í Gøtu.

Teir reinsa motor á Sirius, sigur Gunnar Mohr. Skipið skiftir eisini klassa, nú tað er uppi. Umframt verður so ymiskt viðlíkahaldsarbeiði gjørt so sum máling o.t.

Tað er eitt sindur deydligt á Skipasmiðjuni á Skála í løtuni, letur Gunnar Mohr at. Hóast tað ikki er nakað óvnaligt, at so er viðhvørt, heldur hann, at tað kundi gott verið meira at gjørt.

Fyri nøkrum árum síðan vóru russisk skip vanligir gestir á Skála. Men tað kemur næstan ikki fyri meira, at tey síggjst har, sigur Gunnar Mohr. Seinni árini er bara onkur hendinga russi komin framvið, og tá hevur vanliga verið talan um havarí, sum bøtast skuldi aftur beinanveg, sigur hann.



*Teir hava skift gronina á Sólborg og gjørt annað umvælingararbeiði umborð, meðan hon hevur staðið í turrdokkini á Skála. Sirius stendur á bedingini uttanfyri*

*Mynd: Edvard Joensen*



# Kvinnufeløgini eru snópislig

**– Danska fosturtøkutiltakið avdúkar, at kvinnufeløgini í Føroyum ikki arbeiða fyri at hjálpa føroyskum kvinnum, ið vilja hava fosturtøku ella rættindi til fosturtøku. Hetta metir tíðindakvinnan Brynhild Thomsen út frá kjakinum, sum verið hevur um fosturtøku í seinastuni**

FOSTURTØKUMÁLIÐ
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

– Eg havi fylgt við kjakinum um fosturtøku síðan í 50 árunum, og eg kann í dag bert staðfesta, at kjakið ikki hevur flutt seg ein tumma seinastu 50 árini.

Orðini eigur Hanna Joensen, sum var biðin um at siga sína hugsan um fosturtøkumálið í Føroyum á donsku sjónvarpsrásini TV2, sum í sending sunnukvøldið varpaði ljós á fosturtøkumálið í Føroyum.

Í farnu viku kom enn einaferð røringur í fosturtøkuspurningin í Føroyum, eftir at fólkatingslimurin, Kamal Qureshi, og felagið, Kvindeligt Selskab, boðaðu frá einum átaki, sum skal hjálpa føroyskum kvinnum at fáa fosturtøku í Danmark.

Seinastu árini hevur fosturtøkumálið verið javnan upp og vent, kortini uttan, at politiski myndugleikin er komin nærri at taka støðu í málinum komið.

Vit hava spurt tíðindakvinnuna, Brynhild Thomsen, sum hevur fylgt fosturtøkumálinum gjølla seinastu árini, hvør orsøkin er til, at tað er so tungt hjá føroyingum at taka eina støðu í eldfima málinum

## Ættarliðsskiftið

– Orsøkin er sjálvandi fyrst av øllum stóra mótstøðan í Føroyum móti fríari fosturtøku. Síðani er tað tí, at Danmark og fría fosturtøkan har verður brúkt sum ventilur, so avleiðingarnar av føroyska abortforboðnum verða minni sjónskar.

– Í triðja lagi er tað tí, at løgtingslimir hava ov lætt við at lata vera við at gera tað, sum teir eru valdir til, nevniliga at taka avgerðir og siga, hvat tey meina. Mangir teirra umbera seg jú við, at danskarar hava skuldina, tí talan er um eina danska lóg, men gloyma við vilja at siga, at fosturtøkuskipanin er sum hon er, tí hetta er avleiðingin av, at føroysku politikararnir ikki tíma at gera sítt arbeiði.

– Harafturat aftra bæði politikarar og vanlig fólk seg við at fara upp í orðaskiftið, tí klimaið er so kolandi heitt. Um prísurin fyri at blanda seg er, at tú verður stemplað sum ógudilig ella ein barnamordari, so velja mong at tiga. Og tað gera tey flestu so, enntá eisini kvinnufeløgini, sigur Brynhild Thomsen og vísir á, at tað er sera avdúkandi, at eitt danskt átak skal til, fyri at føroyskar kvinnur kunnu fáa vegleiðing og stuðul til at fara av landinum fyri at fáa fosturtøku. Hetta kann ikki sigast annað enn at vera ein fiasko fyrikvinnufeløgini í Føroyum, - serliga nú tað er komið fram, at tað vóru føroyskar kvinnur sum av fyrstani tíð vildu hava dansk Kvindesamfund - og ikki tildømis Havnar Kvinnufelag - at gera ein hjálpargrunn, heldur hon.

Sum journalistur hevur Brynhild Thomsen mangan undrast á, hví kvinnufeløgini í Føroyum hava verið so ósjónlig í fosturtøkuspurninginum. Í kjaksendingini í SvF týskvøldið kom undan kavi, at føroysku kvinnufeløgini ikki eru á einum máli, hvørt frí fosturtøka skal valda í Føroyum.

Bergtóra Hanusardóttir vísti á, at Havnar Kvinnufelag stuðlar fríari fosturtøku, meðan kvinnufeløgini á bygd eru ímóti.

*Er trupulleikin ikki bara, at føroysku kvinnufeløgini ikki vilja hava fría fosturtøku í Føroyum, og heldur ynskja status quo?*

– Jú, tað er eitt gott boð. Aðrastaðni er vanligt, at kvinnufeløg generelt stuðla ynskinum um fría fosturtøku, men mótstøðan í Føroyum er eftir øllum at døma so stór, at sjálvt kvinnufeløgini arbeiða ímóti rættinum hjá kvinnum at ráða á egnum kroppi. Men Havnar Kvinnufelag, sum sigst vera einasta felag, ið er fyri fríari fosturtøku, hevur eftir míni meining ein stóran trupulleika, um felagið veruliga ynskir at fremja sítt sjónarmið um fría fosturtøku. Felagið er púra ósjónligt, og spurningurin er um teirra blunda-og-krógva-strategi ikki er skaðilig fyri teirra egnu dagsskrá og dagsskránna hjá teirra limum, vísir Brynhild Thomsen á.

– Tey eru fullkomiliga ósjónlig. Sum journalistur hevur tú ringt við at finna hesi feløg, og tær kvinnur sum mynda tey. Tey eru ikki á netinum og næstan heldur ikki í telefonbókini, og tí kanst tú seta spurningin, hvussu ein 16-ára gomul genta skal finna tær fyri at fáa vegleiðing í eini støðu, har hon ynskir fosturtøku, tá vit journalistar hava ilt við at finna tær og fáa tær at siga nakað, spyr Brynhild Thomsen.

Hon heldur sum nevnt, at møguleikin hjá føroyskum kvinnum at fara til Danmarkar at fáa fosturtøku er ein orsøk til, at føroysku kvinnufeløgunum ikki stríðast harðari fyri málinum.

– Var tað ikki so lætt at fara av landinum fyri at fáa fosturtøku, so høvdu vit kanska sæð kvinnur fari út á barrikadurnar, í øllum førum tær organiseraðu, heldur hon.

## Politikarar uttan mót

Brynhild Thomsen vísir á, at tulkingin av fosturtøkulógini fra 1956 er avgjørt ein orsøk til, at bæði kvinnufeløgini og politikarar hava so torført við at taka eina støðu í málinum.

– Tað skerst ikki burtur, at landssjúkrahúsið og læknarnir hava fingið fríar ræsur at tulka lógina liberalt - altso taka atlit til t.d. sosial viðurskifti, tá tey hava skulað játtað eina fosturtøku - enn sjálv lógin heimilar. T.v.s. at vit hava onga skottrygga tulking av lógini, men nettupp tí, so veldst alt um, hvør situr í landsstýrissessinum, og hetta er undirgravandi fyri rættartrygdina, heldur hon.

Hon vísir á, at tað tykist sum um, at bæði politikarar og kvinnufeløgini vilja varðveita verandi skipan við einum forboði, sum kortini verður brotið í tí dulda, heldur enn at taka eitt veruligt orðaskifti og eina avgerð í tinginum.

Brynhild vísir á, at møguliga óttast poltikararnir og kvinnufeløgini, at tingið ynskir eina strangari tulking av lógini, og harvið versna møguleikarnir hjá kvinnum at fáa fosturtøku.

– Í fyrsta lagi er hetta hyklarí og vandamikið fyri rættarkensluna, tá politiska leiðslan stuðlar lógarbrotum av berari røringsangist, men hetta er eisini at skáka sær undan ábyrgd. Og so kann man av røttum spyrja, hví tramin politikararnir hava boðið seg fram at stýra landinum, tá teir so týðiliga ikki vilja stýra kortini, spyr tíðindakvinnan

Hon heldur ikki, at henda støðutakan kann tulkast øðrvísi enn, at politiska valdið er hoknað undir vandanum fyri einum totalforboði fyri fosturtøkum. Men vit fáa ikki greiðu á, hvat úrslit tingið hevði komið til, tí tingið ikki vil viðgera málið, sigur hon.

– Men sum nú er, har meirlutin tykist ganga inn fyri eini skipan, har tað er "siðvenjan" at taka atlit til kvinnuna meira enn atlit til strongu lógina, ið ræður, so átti tað at verið gjørligt at fingið eina lóg ígjøgnum, sum loyvdi hesi "siðvenjuni", metir hon.

## Barberað demkrati

– Politikararnir í Føroyum hava mangan als onga virðing fyri "bleytum" málum og harav heldur ikki hava virðing fyri teimum borgarum, sum kunnu hugsast at verða kroystir, tí politikararnir bara lata tingini flóta. Tak málið um skrásett parlag, har ein politikari - enntá ein, sum sigur seg ganga inn fyri rættindum til samkynd - skrivar eina grein undir yvirskriftini: "Er homoseksualitetur etandi". Hendan yvirskriftin sigur næstan alt.

Tíðindakvinnan heldur, at vit í Føroyum hava eitt barberað demokrati, sum hon málber seg. Føroysku politikararnir hugsa meir um fisk og brýr, meðan týðandi tættir í demokratinum sum javnrættindi og borgararættindi verða tilvitað skúgvaðir til viks.

– Tað, sum dominerar, eru pengar, fiskur og samferðsla - og tí hava vit eisini eina ógvuliga óraffineraða og barberaða útgávu av demokratii í Føroyum. Føroyskir politikararnir eru demokratiforskrektir, og fleiri ganga als ikki inn fyri liberalum borgararættindum, sigur Brynhild Thomsen.

– Tað er eygnarívandi, at alt ES nú stendur á øðrum enda, tí ein kommisserkandidatur hevur sagt at homoseksualitetur er synd. Í næstu viku kann øll ES-Kommissiónin falla, tí hetta eina úttalilsi - sambært ES-parlamentinum - er í andsøgn við virðini, ið ES stendur fyri. Men hetta er tað reina vatn, samanborið við, hvat sami minniluti nærum dagliga skal hoyra frá pørtum av politisku leiðsluni í Føroyum.



*– Var tað ikki so lætt at fara av landinum fyri at fáa fosturtøku, so høvdu vit kanska sæð kvinnur fari út á barrikadurnar, í øllum førum tær organiseraðu, heldur Brynhild Thomsen*

*Mynd: Gunnvør Hofgaard*